## ES minni menningarhjálp

Evropasamveldið hevur gjørt av at skerja hjálpina til menningarlondini. Upprunaliga høvdu tey 27 limalondini í samveldinum avtalað at lata 0,55 prosent av bruttotjóðarframleiðsluni í menningarhjálp næsta ár, men búskaparkreppan hevur nú fingið londini at skerja játtanina, skrivar Ritzau. Danski ráðharrin í menningarmálum, Ulla Tørnæs, er sera vónsvikin av avgerðini, sum eftir hennara tykki sáar iva um trúvirðið hjá ES sum felagsskapi. Danmark er tað ES-landið, sum letur mest í menningarhjálp. Danska hjálpin er 0,83 prosent av bruttotjóðarframleiðsluni.



## USA setir skuldarmet

Fyri fyrstu ferð í amerikonsku søguni er skuldin hjá tí almenna farin upp um 12.000 milliardir dollarar. Tøl hjá fíggjarmálaráðnum í Washington vísa, at seinasta fríggjadag skyldaði tað almenna 11.999 milliardir dollarar, men at í gjár var talið komið upp á 12.031 milliardir. Fer skuldin upp um tá ásetta skuldarhámarkið, sum er 12.104 milliardir dollarar, skal Kongressin góðtaka tað, ella skulu sparingar gerast í tí almenna rakstrinum. Umroknað til okkara pengar svarar talið til meiri enn 60.000 milliardir krónur. Ein munandi partur stavar frá almennu hjálpini til bankakervið.

# SF og DF vunnu danska kommunuvalið

**Flokkarnir úti á høgra og vinstra vongi vunnu danska kommunuvalið í gjár. Hóast aftur-gongd fingu Sosial-demokratarnir borg-arstjórarnar í teimum størstu býunum**

VAL Í DANMARK

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann góða gongdin hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum í longri tíð sást týðiliga aftur á kommunuvalinum í gjár, tá flokkurin fekk sítt besta úrslit nakrantíð. Á seinasta kommunuvali fekk SF 7,4 prosent av atkvøðunum, men í gjár var úrslitð 14,5 prosent.

Veljarakanningarnar spáddu eisini Danska Fólkaflokkinum eitt gott úrslit, og so varð. Úrslitið var tó ikki so gott, sum tær fyrstu forsagnirnar bendu á, men tá avtornaði, fekk DF 8,1 prosent av atkvøðunum, sum var 2,2 prosentstig meiri enn á seinasta kommunuvali.

Teir stóru tapararnir í gjár vóru teir báðir stóru flokkarnir, Sosialdemokratarnir og Vinstri. Sosialdemokratarnir varðveittu kortini støðuna sum landsins størsti flokkur við 30,7 prosentum, og Vinstri endaði á 24,8 prosentum. Tey Radikalu og Eindarlistin høvdu eisini afturgongd, meðan Konservativi fekk eina lítla framgongd. Liberal Alliance stillaði fyri fyrstu ferð upp á kommunuvali og fekk 0,3 prosent av atkvøðunum.

### S vann stóru býirnar

Undan valinum kunngjørdi leiðslan hjá Sosialdemokratunum, at hennara mál var, at flokkurin skuldi verða tann størsti, og at hann skuldi fáa borgarstjórarnar í fýra teimum størstu býunum. Bæði eydnaðust.

Fyrrverandi løgmálaráðharrin Frank Jensen verður yvirborgarstjóri í Keypmannahavn. Flokkurin misti atkvøður í høvuðsstaðnum, men er framvegis tann størsti í býráðnum.

Í Århus kommunu varð sosialdemokraturin Nicolai Wammen afturvaldur, og soleiðis var eisini í Aalborg, har Henning G. Jensen heldur fram sum borgarstjóri.



*Sólrun Løkke Rasmussen fekk 800 persónligar atkvøður og kom í býráðið í Gribskov kommunu*

Í Odense var spurningurin, um sosialdemokraturin Anker Boye kundi endurvinna borgarstjórasessin frá tí konservativa Jan Boye. Tað gjørdi hann.

Tað skal tó sigast, at bæði í Odense og Aalborg var tað framgongdin hjá SF, sum tryggjaði Sosialdemokratunum borgarstjórasessirnar.

### Løkke fær ábreiðslur

Vinstri misti ræðið í fleiri donskum kommunum á valinum í gjár, og fleiri hava hug at geva floksformanninum, Lars Løkke Rasmussen, ein part av skyldini, tí hann hevur ikki verið so virkin í valstríðnum sum hinir floksformenninir.

Claus Borch, sum er býráðslimur fyri Vinstra í Skanderborg, heldur, at veljararnir sóu ov lítið til formannin undir valstríðnum.

Hann og onnur valevni hjá Vinstra halda, at Lars Løkke Rasmussen hevur verið ov upptikin av at fáa eitt gott úrslit á veðurlagsráðstevnuni í næsta mánað, og at tað sæst aftur á úrslitinum í gjár.

### Sólrun fekk gott úrslit

Ein tann dyggasta smeitin fekk Vinstri í Gribskov kommunu á Norðursælandi, har flokkurin misti fýra býráðslimir. Tað er eitt sindur merkisvert, tí tað er har, forsætisráðharrin býr. Men gekk tað illa hjá flokkinum, kann formaðurin í hvussu er fegnast um, at kona hansara fekk eitt gott valúrslit.

Sólrun Løkke Rasmussen var uppstillað sum nummar sjey á listanum hjá Vinstra, men fekk triðflestar atkvøður. Tá uppteljingin var liðug, hevði hon fingið meiri enn 800 persónligar atkvøður, og tað var ivaleyst til at tryggja henni pláss í býráðnum.

Sólrun Løkke Rasmussen segði í gjárkvøldið, at sum býráðslimur fer hon serliga at arbeiða við skúlamálum.



*Á nýggjárinum tekur Frank Jensen við sum yvirborgarstjóri í Keypmannahavn*